Havumhvørvismál yvirtikin

1.mai eru lóggávu- og umsitingarvaldið í havumhvørvismálum á føroyskum hondum

YVIRTØKA
Heri á Rógvi

Havumhvørvismál eru nú klár at verða yvirtikin til at verða føroyskt málsøki.

Samgongan hevur sett sær fyri at fremja eina rød av yvirtøkum hesi fýra árini við maktina í føroyska samfelagnum.

Tann formelli parturin av yvirtøkuni fór fram fríggjadagin. Tá skrivaðu Eyðun Elttør, landsstýrismaður við umhvørvismálum, og Hans Chr. Schmidt, umhvørvismálaráðharri í Danmark, undir avtaluna.

Sjálvur yvitøkudagurin verður 1. mai, tá lóggávu og umsitingarvaldið kemur á føroyskar hendur.

Arbeitt verður í løtuni við at fáa í lag samstarvsavtalu millum donsku og føroysku umhvørvisfyrisitingarnar. Samstarvsavtalan verður væntandi undirskrivað fyri 1. mai 2003, verður upplýst í tíðindaskrivi.

– Landsstýrismaðurin fer í næstum at seta í gildi fleiri kunngerðir, sum hava heimild í havumhvørvisverndarlógini, m.a. reglur um tøming av burturkasti og olju frá skipum. Seinni verður farið undir at dagføra havumhvørvisverndarlógina. Eitt dagført lógaruppskot kann leggjast fyri løgtingið í heyst, upplýsir Oljumálaráðið í tíðindaskrivi.

Eyðun Elttør fekk fríggjadagin havumhvørvismál á føroyskar hendur.

Mynd: Álvur Haraldsen.

Tilboðsferðir

frá Atlantic Airways

Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

Bilegging áðrenn 15/3 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 16/1 til 24/3 2003.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, barn undir 2 ár minus 90%.

1860,- eftur og fram íroknað ferðasavgjald

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag og leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

Bilegging áðrenn 15/3 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 16/1 til 24/3 2003.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, barn undir 2 ár minus 90%.

2360,- eftur og fram íroknað ferðasavgjald

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

Bilegging áðrenn 13/3 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 9/1 til 24/3 2003.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, barn undir 2 ár minus 90%.

1479,- eftur og fram íroknað ferðasavgjald

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferðin skal vera hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

Bilegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllur - FO-380 Sørvágur
Tlf: 34 10 10 - Fax: 34 10 01 - booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

Gullbrúðleyp

Leygardagin 18. januar hava hjúnini Ruth og Tummas Hansen í Miðvági, gullbrúðleyp.

Pápi er elstur av 4 beiggjum, sonur Hansinu og Jógvan Hansen í Lonini í Miðvági. Bert 6 ára gamal gjørdist hann faðirleysur. Hann kom tí eisini at hava lutin sum maður í húsinum rættiliga ungur. Altið hava teir verið góðir og staðið væl saman, beiggjarnir, og hjálpt hvørjum øðrum væl.

Mamma er dóttir Dánjal og Jastrid Joensen. Omma og abbi fingu 10 børn, so stórur var barnaflokkurin á bakkanum. Mamma fór ung niðan í hús at búgva, hjá Andrias innan fyri á, har hon eisini tænti, til hon giftist.

Tey giftust inn uppi í Lon, har tey búðu tey fyrstu 7 árini, inntil tey fluttu í húsini. Vit elstu genturnar minnast barnaárini í Lonini, sum sera rík. Ein onnur tíð var, einki elektrisitet ella sentralhiti var í lonini okkara tíð. Einki útvarp ella sjónvarp. Kúgvin, seyðirnir og hønurnar í kjallaranum. Og so ommurnar í húsinum. Tiðin, sum í dag er ein mangulvøra hjá fólki, var tá ríkilig at hugna og lesa søgur.

Mamma var fyrstu árini heimagangandi. Tó so, ikki kann sigast, at hon var arbeiðsleys. Hon bant fyri fólk við maskinu,og rúgvan vildi verið stór, um allar troyggjurnar vóru samlaðar, sum hon hevur lagt úr hondum. Hon var í fiskaarbeiði, legði sild. Enn í dag eru menn, sum taka til, hvussu kvikar tær vóru í hesum arbeiði. Og so var kúgv í húsinum, sum skuldi mjólkast og fóðrast 2 ferðir hvønn dag.

Mamma fór seinni at arbeiða úti, fyrst á flakavirkinum, og síðan í nógv ár í handlinum hjá Andrias. So tey yngru systkini høvdu ikki á sama hátt mammu inni allan dagin. Men hóast tað, so hevur hon stákast á sama hátt, bundið og seymað, bakað og matgjørt til okkum øll.

Hon kann ikki lata vera, hon elskar at rokast.

Og enn er hon til dystin fús hvørja ferð, onkur skal hava okkurt málað ella sett í stand.

Og at forkela okkum og okkara við onkrum góðum hvørja ferð, vit koma inn um hurðina. Tú føler teg altið vælkomnan, so ofta er fult hús hjá teimum.

Pápi fór ungur at sigla, var fýrbøtari við trolarum tey fyrstu árini. Eisini róði hann út í Grønlandi í nøkur ár. Seinni gjørdist hann heimamaður, fór at koyra lasbil. Mangt tungt lessið hevur hann knossað, bæði av frakt og skrell gjøgnum árini. Eisini hevði hann starvið sum kranaførari á kajuni líka til fyri fáum árum síðan.

Søgufróður hevur pápi altið verið.

Okkum nýttust onki sjónvarp, tí tá pápi segði frá, var tað so spennandi, at eingin filmur kundi gjørt søgurnar meira livandi enn hann gjørdi tær.

Ógloymandi upplivilsi hava túrarnir úti í nátturuni hvørt summar verið. Tá beiggjanir báðir fóru við seyði norð á Fjallavatn, og øll skreiðan var við.

Og um sumrarnar í hoyna, úti á tróðni, í summarhúsinum og í ánni. Sanniliga dagar, sum standa sum perlur á okkara lívsvegi.

Sum foreldur hava tey verið einastandandi, og vit kunna tí ikki takka teimum nokk fyri allan tann kærleika og stuðul, tey hava givið okkum seks systkunum.

Eg vil við hesum orðum ynkja tykkum báðum hjartaliga tilukku við gullbrúðleypinum, og góðan byrð í framtíðini.

HáP

Bispur:

Ókristiligt at revsa við deyða

– Deyðarevsing er ókristilig undir øllum umstøðum, men vit liva í einum heimi, sum ikki er Guðs ríki, og tí verður tað ofta stødan hjá tí einkulta menniskjanum, ið er avgerandi, sigur Hans Jacob Joensen, bispur

DEYÐAREVSING
Heri á Rógvi

Deyðarevsing er ókristilig.

Hesum er ovasti føroyingurin innan kirkjuna, Føroya bispur, ikki í iva um. Sjálvur er hann eisini hart ímóti hesum slagi av straffi.

Fyrr í vikuni prentaðu vit samrøðu við Anniku Sølvará, forkvinnu í Amnesty Føroya deild, um hetta sama evnið, og vit hava nú eisini spurt okkum fyri hjá bispi.

– Deyðarevsing er ókristilig undir øllum umstøðum, men vit liva í einum heimi, sum ikki er Guðs ríki, og tí verður tað ofta stødan hjá tí einkulta menniskjanum, ið er avgerandi, sigur Hans Jacob Joensen.

Oftast kann tað vera ein samvitskuspurningur hjá tí einstaka menniskjanum at taka støðu til, metir bispur. Hóast deyðarevsing greitt er ókristilig, so verður hetta framt í kristnum londum, og bispur heldur hetta hava nakað at gera við, hvørja støðu fólk hava til rættvísi og rætt.

– Tað liggur heilt greitt í kristindóminum, at Guð tekur og gevur lív.

Vit hava eisini eitt boð, sum sigur, at tú mást ikki sláa í helt. Men hetta boð er komið frá jødum, sum oftani vóru í kríggi, har ein givin konsekvenstur jú er at taka lív, sigur Hans Jacob Joensen.

Sjálvverja

Bispur heldur, at tað í síðsta verður tað einstaka kristna menniskjanum, sum skal forsvara sínar syndir og liva við sínum gerðum. Støðutakanin hjá tí einstaka byggir ikki altíð kristilig virði, metir bispur.

Hóast boðið frá Guði, so verður tað av fleiri akseptera at sláa í hel.

– Tann vanliga fatanin hevur verið tann, at er tað fyri at verja seg sjálvan, so verður tað hildið at kunna rættvísgerast at taka lív frá øðrum, sigur Hans J. Joensen.

Bispur er skjótur at leggja afturat, at deyðarevsing ikki kann rættvísgerast á henda hátt.

Deildar meiningar eru millum trúgvandi kristin um tað at sláa í hel.

– Vit kenna tað frá pasifistum, at teir nokta at gera hertænastu, tá hetta kann innibera at luttaka í kríggi, og hetta vil so innibera at sláa í hel.

Hinvegin kann ein hugsa sær, at tað hevði illa borið til at niðurbart nasismuna og allan hennnar ræðuleika uttan at nýta vald.

Tað verður sostatt eisini ein spurningur um alternativ, sigur Hans J. Joensen.

Sjálvur er bispur sum nevnt hart ímóti deyðarevsing. Hann metir tað vera betri hóskandi, at staturin rindar kostnaðin fyri at halda fangar handan rimar. Ikki minst tá hugsað verður um, at ósek fólk kunnu hugsast at verða revsaði við lívinum. Eisini vísir bispur á, at hesin revsihátturin ikki hevur virkað so fyribyrgjandi, sum tað kanska hevur verið ætlanin.

— Tann einasta verjan fyri deyðadómi kann vera, at fólk hava tvey alternativ, ið eru deyðarevsing ella lívlangt fongsul, og hetta eru báðir ringir kostir, sigur Hans J. Joensen.

Men persónliga stødan hjá bispinum er greið:

– Sjálvur havi eg onkuntíð hugsað um, hvussu tað mann vera at geva innspræningina. Hetta hevði eg ikki kunna klárað. Gongur tú inn fyri deyðarevsing, so mást tú eisini verða klárur til at útføra straffin, metir bispur.

– Tað liggur heilt greitt í kristindóminum, at Guð tekur og gevur lív, sigur Hans J. Joensen, bispur, sum sjálvur er hart ímóti deyðarevsing

vinarkall

DANMØRK 40% at spara
ÍSLAND 30% at spara
NOREG 54% at spara
USA 54% at spara

Tú skuldi eisini fingið tær Vinarkall pluss

Kall fartelefon 30% at spara

Danmark 0,99 kr./min.

Nú eisini bíligari til Kall-fartelefonir

Tørvigt er nú bernini eru farin av landinum at lesa ella arbeiða. Eisini Beggi tór aftur til Danmarkar. Hóast Mamma leingist, er hon lukkulig. Hon hevur jú Vinarkall. Tí kann hon ringja til Beggja sæði snimma og seint og tosa nógv bíligari. Systi fer ongan veg enn. Hon er heima og hevur Kall fartelefon. Mamma hevur tí fingið sær Vinarkall pluss. Nú kann Mamma eisini tosa bíligari við Systi í Føroyum.

Eitt tú kundi hjá Kalli kanst tú við Vinarkalli til dømis tosa við sonin ella dóttrina í Danmark fyri einans 0,99 um minuttin.
Hevur tú eisini valt Vinarkall pluss, spanir tú 30 prosent, tá ið tú til dømis tosar við dóttrina ella sonin, ið hevur fartelefon frá Kalli. Tosa otta við tey, tú ert góð við.

www.kall.fo

ring 20 20 20

kall
Orðið er lítt